# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*–Fýra av teimum, sum eg var saman við, eru horvin*

*kvinna í flóðalduøkinum*

STUTT SAGT

## Landa tiknar trolarar

Løgreglan í Tromsø í Noregi fór í morgun undir at tøma lastina á tveimum sponskum trolarum, sum sjóverjan hevur tikið fyri ólógligan fiskiskap. Arbeiðið fer at taka fleiri dagar, tí trolararnir hava fleiri hundrað tons inni, skrivar Aftenposten.

Fyribils eru teir báðir sponsku skipararnir ákærdir fyri at hava falsað dagbókina og fyri at hava seinkað arbeiðinum hjá myndugleikunum.

Tað er greitt, at teir báðir skipararnir kunnu vænta sær stóra bót, tí herfyri fekk skiparin á einum øðrum sponskum trolara heilar 15 mió. norskar krónur í bót fyri ólógligan fiskiskap. Hann hevur kortini ikki tikið við henni enn, og tí liggur tann trolarin framvegis við bryggju í Tromsø.

Spanska reiðaríið Pesquera Ancora eigur allar tríggjar trolararnar, sum norska sjóverjan hevur tikið. Ein fjórði trolari hjá reiðarínum royndi eisini ólógliga við Svalbard, men hann rýmdi, tá hinir blivu tiknir. Sum skilst gjørdi tann skiparin av at sigla heim til Spania.

## Skulu verja ísbjørnina

USA og Russland eru á einum máli um, at londini eiga at verja ísbjørnina í tí arktiska økinum.

Í gjár samtykti amerikanska Umboðsmannatingið at fremja tiltøk, sum skulu verja ísbjørnina. Eftir samtyktini fer USA at brúka 10 mió. krónur um árið tey næstu trý árini til endamálið. Samstundis hava amerikonsku og russisku myndugleikarnir samtykt at avmarka rættindini hjá fólki í tí arktiska økinum at veiða ísbjarnir. Tey sleppa einans at veiða ísbjarnir til egna nýtslu, og allur handil við ísbjarnaúrdráttum er strangliga bannaður. Tað er serliga í Asia, at ymsir úrdráttir úr ísbjarnum verða seldir á svarta marknaðinum. Eitt nú verður gallið brúkt til heilivág, skrivar AP.

Granskarar halda, at tað eru millum 20.000 og 25.000 ísbjarnir í tí arktiska økinum, men at talið fer at minka eini 30 prosent tey næstu 45 árini. Tað kemst serliga av broytingunum í veðurlagnum, siga granskararnir.



## Likka ger ónáðir

Í Havnarfjørðinum í Íslandi eru fólk farin at kæra seg um tær nógvu likkurnar, sum halda til í býnum.

Blaðið Vísir skrivar, at likkurnar eru so nógvar og ágangandi, tá tær leita sær føði í býnum, at børnini ræðast tær. Tí hevur kommunan gjørt av at fremja tiltøk, sum skulu skerjað tað stóra talið á likkum, skrivar blaðið.

Tað er ikki bara í Havnarfjørðinum, at fólk hava ampa av likku. Tað sama er í Reykjavík, og eisini har hevur kommunan gjørt av at gera okkurt við málið, skrivar Vísir.

# Tá svarti veggurin kom inn á land

**– Brádliga sá eg ein svartan vegg uttanfyri, sigur ein belgiskur ferðamaður, sum slapp livandi frá flóðalduni á Java í gjár.**

FLÓÐALDA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*



*Meiri enn 300 druknaðu í flóðalduni.*

Nógv fólk vóru á strondini, tá flóðaldan skolaði inn yvir fjøruna og láglendið innanfyri og tók bæði livandi og deytt við sær.

Indonesisku myndugleikarnir søgdu fyrrapartin, at meiri enn 300 fólk eru funnin deyð, og at umleið 150 eru ikki komin afturíaftur. Uttanríkisráðið í Stockholm kunngjørdi í morgun, at tveir svenskir smádreingir, níggju og fýra ára gamlir, eru ikki sæddir síðani flóðalduna. Pápi teirra er bjargaður og liggur á einum sjúkrahúsi. Ein svenskur maður og ein svensk kvinna eru ikki komin afturíaftur, og niðurlendsku myndugleikarnir siga, at fýra av teirra ríkisborgarum eru ikki komnir afturíaftur.

Flóðaldan skolaði inn yvir frítíðarbýin Pangandaran, har serliga indonesisk ferðafólk plaga at halda til um summarið.

– Aldan kom so brádliga, og vit kvikaðu okkum niðanfrá. Fýra av teimum, sum eg var saman við, eru horvin, sigur ein kvinna, sum var á strondini, tá flóðaldan kom inn á land.

Ein belgiskur ferðamaður, sum var so heppin at verða bjargaður, greiddi tíðindastovunum frá, at tað var sum at síggja inn í ein svartan vegg, tá flóðaldan kom.

# Støðan í Irak versnar

**Teir seinastu dagarnir hava verið sjáldsama blóðugir í Irak, og myndugleikarnir tykjast hjálparleysir.**

IRAK

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tað seinasta samdøgrið hevur verið ógvuiliga blóðugt í Irak.

Í gjár doyðu umleið 80 fólk, tá vápnaðir menn skutu frá hond á einum marknaðartorgi í einum býi sunnan fyri Bagdad. Sambært myndugleikunum skutu menninir fyrst tveir løgreglumenn, sum stóð á varðhaldi á torginum, og síðani skutu teir eftir øllum, sum fyri var.

Í morgun fóru ávaringarlúðrarnir aftur at ýla, hesaferð í býnum Kufa har suðuri í landinum. Sambært myndugleikunum hevði ein maður sitið í einum bili og bjóða fólki arbeiði, og tá hann helt, at nóg mong vóru komin at lurta eftir sær, sprongdi hann eina sjálvmorðsbumbu, sum hann hevði í bilinum. Minst 54 fólk doyðu, og næstan 100 vórðu særd, skrivar Reuters.

Iraksku myndugleikarnir siga, at tað er vorðið rættiliga vanligt, at yvirgangsmenn bjóða fólki arbeiði og síðani speingja seg sjálvan og tey í luftina.

Reuters skrivar, at amerikanararnir og irakasku myndugleikarnir hava sett næstan 50.000 hermenn at forða yvirgangi í Bagdad, men at tað hevur ikki víst seg at gera nakran mun. Álopini gerast tvørturímóti alt meiri blóðug.





Ja takk! Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Tekna teg sum haldara nú fyri einans
450,- um ársfjórðingin
Sparið 395,- í mun til leysasølu!

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

Send lepan til:
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn